# Broyting

**í Almennu Byggisamtyktini fyri part av økisparti B2.2 til D5.3 innanfyri 3. grundlendi í Klaksvíkar Kommunu**

Við hesum verður kunngjørt sambært reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, at Klaksvíkar Býráð á fundi 16. desember 2004 hevur samtykt at broyta ásetingarnar fyri matr.nr. 91 og 92 í økisparti B2.2 innanfyri havnaøki til mentanarøki - merkt D5.3 - útlagt til trivnaðar,- mentanar,- handils- og matstovuvirksemi.

Broytingin liggur frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni til 23. mai 2005.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi seinasta lagi 1. august 2005 fyri at koma við í býráðsins endaligu viðgerð av broytingini.

Klaksvík 30.apríl 2005

**Klaksvíkar Býráð**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Broyting av upplatingartíð á Røntgendeildini

Frá 1. mai 2005 er upplatingartíðin á Røntgendeildini fyri kanningar uttan tíðaráseting broytt.

**Opið er kl. 08.00-12.00**

**Røntgendeildin á Landssjúkrahúsinum**

# Heimarøktin Sandoyar øki

## søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingi

Fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi frá 1. juni 2005 ella eftir nærri avtalu, til 31. august 2006.

Søkt verður eisini eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum sum frítíðaravloysarir í tíðarskeiðnum 1. juni 2005 til 31. august 2005. Setunarbrøkir eftir avtalu. Umsøkjarnir mugu kunna arbeiða í skiftandi vaktum.

Heimarøktin Sandoyar Øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims- og sambýlis røkt og rakstur er samskipað.

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi:**
- Við røktarfakligum royndum.
- Sum hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar.
- Sum hevur hug og hegni at undirvísa og vegleiða starvsfelagaðar, lesandi og næmingar.
- Sum hevur hug at starvast bæði inni á bústovnum og úti í heimarøktini.

**Vit kunnu bjóðað:**
- Eitt spennandi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt.
- Eitt starv við skiftandi avbjóðingum.
- Eitt starv í einum økið sum er í støðugari menning.

Størvini verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran Ásu Davidsen tlf. 213890 / 361749.

Umsókn við avriti av autorisatión, prógvum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktina Sandoyar Øki, Àargarður 210 Sandur**

**Umsóknarfreist: 17. mai 2005**

# Miðnámsskúlin í Suðuroy

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2005 nøkur størv sum adjunktur/lektari ella tímalærari leys at søkja.

Eitt starv í evnafrøði og eitt starv í samfelagsfrøði saman við øðrum studentaskúlalærugreinum, herundir telduvegleiðari.

Tímar, uml. 4, í hesum lærugreinum: spanskt, enskt, latín, heimsspeki, alis/evnafrøði, lívfrøði, geografi, tónleikur, fornaldarfrøði og sálarfrøði.

Umsøkjarar skulu tilskila, í hvørjum lærugreinum teir hava undirvísingarførleika (høvuðsgrein, hjágrein ella annað), og um teir hava námsfrøðiliga útbúgving. Umsøkjarar, ið ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, og sum verða settir, skulu í august mánaði taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan í fast starv at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, og um teir ikki hava tað, at teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vitan um hetta. Harumframt fer skúlin at leggja dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, nýggir arbeiðshættir og KT eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans ella við at vitja heimasíðu skúlans: www.midnam.fo

Starvssetanin verður sambært sáttmála millum Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF) og Fíggjarmálastýrið. YF-umsóknarbløð fáast frá Yrkisfelagnum ella frá skúlanum (tlf. 373622, faks 374026, e-mail midnam@midnam.fo)

Umsóknin skal sendast til

**Miðnámsskúlan í Suðuroy**
att. Ole Laursen, deildarleiðari
900 Vágur

í seinasta lagi 10. mai 2005.

**FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ**
Hoydalar • FO-188 Hoyvík
Tlf. 312973 • Fax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: kl. 8.00-15.00

Lýst verður eftir tímalærara í **leiklist** 4 løntímar/viku frá 1. august 2005 til 1. juli 2006.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Fíggjarmálaráðið.

Avrit av prógvum ella úrskrift av prótøkubók skal hjáleggjast.

Umsøkjarar uttan endaligt prógv kunnu eisini søkja.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi 9. mai 2005.

**STÓRT BINGO Í ÍTRÓTTARHØLLINI Á SKÁLA 7. MAI KL 17.00**

**Á lutaseðlum verða hesir vinningar:**

1. Gávukort á kr. 1.000,- frá Bónus
2. 1/2 krov
3. Oljureins frá Shell
4. Oksakjøt
5. Gávukort á kr. 1.000,- frá Bónus
6. 1/2 krov
7. Gávukort á kr. 1.000,- frá Shell
8. Oksakjøt
9. Gávukort á kr. 1.000,- frá Bónus
10. Gávukort á kr. 3.000,- frá Smyril Line

**Fyri fulla plátu - eitt íslandskrov og nógvir aðrir góðir lutir**

**SKÁLA STUÐLAR**

# Málaraarbeiði

Viðareiðis kommuna søkir eftir arbeiðstakara at mála nýggja skúlan, gamla skúlan og lærarahúsini á Viðareiði.

Arbeiðið skal verða liðugt í seinasta lagi 10. juni 2005.

Áhugað kunnu fáa meira at vita við at venda sær til kommununa.

**Viðareiðis kommuna**
FO-750 Viðareiði
tlf. 451083 ella 223563
Fax 451094
T-postur: vid.kommuna@kallnet.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!